# Barnadeildin fingið heimasíðu

**Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum hevur nú fingið egna heimasíðu. Ætlanin er, at hetta skal lætta um hjá foreldrum at koma í samband við læknaskrivaran, umframt at kunna um hvat fer fram á deildini**

**BARNADEILDIN**
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




*Tað fyrsta, tú sært, tá tú fert inn á nýggju heimasíðuna hjá barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, er ein mynd av smílandi og glaðum starvsfólkum. Heimasíðan skal ætlandi lætta um samskiftið við deildina. Síðan eitur www.barnadeildin.fo*
*Mynd: www.barnadeildin.fo*

Ein nýggj heimasíða, www.barnadeildin.fo, hevur nú sæð dagsins ljós. Tað er barnadeildin á Landssjúkrahúsinum, sum stendur handan síðuna.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at endamálið við síðuni fyrst og fremst er at gera tað lættari hjá sjúklingum og foreldrum at samskifta við deildina.

Ætlanin er eisini at kunna um hvørji starvsfólkini eru, og hvat fer fram á deildini.

Á heimasíðuni er ein teldupostskipan, har til ber at koma í samband við barnalæknaskrivaran. Um fólk hava praktiskar spurningar viðvíkjandi innleggingar, umsóknum, reseptum o.ø, ber til at senda mail til skrivaran, sum so svarar aftur umvegis mail. Telefontíðin hjá skrivaranum er frá kl 10.30 – 12.30, men við nýggju mailskipanini ber til at koma í samband við skrivaran uttanfyri telefontíðina, og t.d. senda henni spurningar og boð. Hetta fer óivað at lætta um hjá nógvum brúkarum.

Sum er, ber ikki til at skriva beinleiðis til barnalæknarnar, tí við núverandi læknamanning letur tað seg ikki gera hjá teimum at svara spurningum umvegis telduna. Á deildini eru bert tveir barnalæknar, og tí røkkur tíðin heilt einfalt ikki til mailkonsultatiónir. Hetta fer tó vónandi at vera gjørligt einaferð í framtíðini.

Í tíðindaskrivinum verður gjørt greitt, at allar kanningar og innleggingar á deildini tí eisini framyvir fara at krevja ávísing frá vaktlækna ella kommunulækna.

Umframt teldupostskipanina eru ymiskir praktiskir upplýsingar um deildina at finna á síðuni. Eisini eru hagtøl, foreldrafaldarar, har møguleiki er at heinta faldarar um vanligar barnasjúkur, slóðir til ymsar aðrar viðkomandi heimasíður og upplýsingar um sjúklingarættindi. Á síðuni er eisini eitt myndasavn, har til ber at síggja myndir av børnum og starvsfólkum.

Síðan er sera brúkaravinarlig, so tað er ikki tørvur á tí stóra teldukunnleikanum, fyri at fáa gleði av síðuni.

Sí meira á www.barnadeildin.fo.

Ein hjartans tøkk

Eg sendi øllum, sum á løgtingsvalinum leygardagin góvu fólkaflokkinum atkvøðuna, eina hjartans tøkk. Ein serstøk tøkk til tykkum sum hjálptu mær til valið, og til tykkum sum atkvøddu fyri mær persónliga, tað fløvar.



Bestu heilsanir
BÁRÐUR POULSEN



Móttøka

Í sambandi við at Jean Djurhuus er settur sum stjóri á TRYGD, verður móttøka hjá TRYGD á Kongabrúnni, Gongin 7, fríggjadagin 1. februar kl. 15.00–17.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

SENDISTOVAN

Gongin 7
Postboks 44
FO-110 Tórshavn
Tel. 35 81 00
www.trygd.fo

TRYGD
hugsar um teg.